VIÐMERKINGAR

# Heildarætlan fyri búskapin

**Magni Laksáfoss**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Vit hava brúk fyri at allar kreftir arbeiða saman um eini heildarætlan fyri at skapa ein sjálvberandi búskap, í staðin fyri at berjast um hvussu landið skal skipast. Lat okkum fyrst arbeiða miðvíst móti at skapa ein sjálvberandi búskap, fyri síðan at taka spurningin um ríkisfelagsskapin upp aftur til tað tíð.

Komandi árini krevja stórar broytingar, sum vit fyri langari tíð síðan áttu at vera byrja uppá, men frá-farandi landsstýri hevur bara tosað um at minka um inntøkurnar, í staðin fyri at samlast um at økja inntøkurnar.

Fyri at skapa ein sjálvberandi búskap er neyðugt við eini heildarætlan fyri føroyska búskapin, sum skal tryggja eina javna búskapargongd og framhaldandi góð livikor fyri føroyingar.

Alt ov nógvar góðar kreftir eru spiltar uppá kjak um vit skulu vera innafyri ella uttanfyri ríkisfelagskapin. Tað verður sagt at "hús eru bygd", men tey vísa seg at vera tóm, tí hugsa hevur bert verið um at skapa eina pena fasadu, uttan at skapa verulig virðir og innihald. So leingi sum vit ikki hava ein sjálvberandi búskap við spurningurin um ríkisfelagsskapin bert vera ein teoretiskur spurningur.

**Sjálberandi búskap gjøgnum økt vinnulív**

Tað er bert ein háttur at skapa ein sjálvberandi búskap, nevniliga at skapa góðar karmar fyri privata vinnulívið, so framleiðslan í Føroyum kann økjast nokk til at ríkisveitingin gerst óneyðug.

Hetta merkir, at neyðugt er at arbeiða miðvíst móti einum øktum privatum virksemi í Føroyum. Hetta kann ikki skapast eftir bert einum valskeiði, men má gerast við eini langtíðar heildarætlan, sum flokkarnir á tingi arbeiða saman um at fremja.

**Heildarætlanin**

Heildarætlanin skal vera ein rammuavtala. Tvs. at flokkarnir semjast um málið fyri búskapin, nevniliga ein sjálvberandi búskap, og um hvussu hetta skal fremjast í verki í stórum trekkum. Tað vil sjálvsagt vera latið upp til tað einstøku samgonguna um at føra búskaparpolitikkin í sínum valskeiði, men semja skal vera millum flokkarnar um, at búskaparpolitikkurin skal haldast innanfyri karmarnar í heildarætlanini.

Heildarætlanin skal stinga út í kortið hvussu ymsu partarnir av samfelagnum skulu skipast fyri at skapa ein sjálvberandi búskap. T.d. verður neyðugt at umskipa skúlaverkið, almenni sektorurin má umskipast, neyðugt verður at satsa uppá ávísar vinnugreinar og samstundis at skapa góð kor fyri allar partar av privatu vinnuni.

**Semja millum flokkarnar**

Allir flokkar á tingi eru samdir um at arbeiðast skal framm ímóti at føroyski búskapurin skal gerast sjálvberandi. Tá semja er um hetta, er eingin orsøk til at skeldast um hetta mál, men heldur at finna saman, og semjast um eina heildarætlan fyri at skapa ein sjálvberandi búskap. Ein heildarætlan vil skapa tryggleika og kontinuitet, sum er heilt avgerandi fyri at fólkið kann samlast um ein sjálvberandi búskap.

Neyðugt er, at vit øll lyfta í felag fyri at arbeiða miðvíst fyri at tær neyðugu broytingarnar verða framdar í verki.

Ein heildarætlan vil tryggja eina varandi økta framleiðslu, sum, umframt at gera búskapin sjálvberandi, eisini kann tryggja okkum sømilig livikor framyvir. Ein heildarætlan er tískil avgerandi fyri at skapa inntøkur so vit framhaldandi kunnu útbyggja okkara land.

# Eitt føroyskt "STATOIL" sjálvsagt

**Finnleif Guttesen**
*valevni sambandsfloksins í Suðuroy*



Ein oljuhøvuðsstaður í Suðuroy er økismenningarpolitikkur

Í norskum bløðum kanst tú lesa fylgjandi:

Stortingets vedtak om opprettelsen av et oljedirektorat og et statsoljeselskap lokalisert til Stavanger, la grunnlaget for Stavangers videre vekst som oljeby.

**Økismenningar politikkur í Suðuroy**

Hetta er greið tala, myndugleikarnir áseta, hvar oljuumsitingin skal verða og somuleiðis, hvar umsitingin fyri eitt alment oljuselskap skal liggja.

At tað skal liggja í Suðuroy er ein sjálvfylgja, tað er nokk av plássi til hesar umsitingar og somuleiðis er ein útgerðarhavn nærmast við økini, har leita verður eftir olju

**Avgerðarrætturin skal vera føroyskur**

Føroyskir mynduleikar hava enn møguleika fyri at stýra oljufeløgum og øðrum útlendskum kapitali, men teir mugu hava rygg til at stýra og gera broytingar.

At útlendingar skulu avgera, hvussu vit skipa økkum í Føroyum, kann ikki koma upp á tal, men soleiðis sum gongdin er í dag, so er tað eingin ivi um, at tað er kapitalurin uttanlands, sum er við at hava avgerðarrættin og ikki teir fólkavaldu politikarnir.

Eins og norðmenn skulu vit tryggja okkum, at eitt alment oljufelag skal verða "borið" av teimum oljufeløgum, sum fáa loyvi til at taka okkara olju upp.

Hetta føroyska "Statoil" skal tryggja føroysk samfelagsáhugamál á hesum øki.

Verandi samgonga vil ikki hava eitt alment oljufelag, men tað vil sambandsflokkurin og somuleiðis vilja vit í Suðuroy berjast fyri, at økismenningarpolitikkur verður veruleiki.

# Tjóðveldisflokkurin og undirgrundarmálið

**Jógvan Durhuus**
*løgtingsmaður*



Í sera løgnar grein í Dimmalætting og Sosialinum 2. mars 2002, sum er eitt aftursvar til Høgna Hoydal, kemur mítt navn, sum ketta úr høvdatrogi, – hvar eg av Atla Dam verði lagdur undir at hava sagt ósatt.

Atli Dam, sum eg havi verið saman við til nógvar samráðingar, meti eg at vera ein stak dugnaligan samráðingarleiðara, – og tað var hann eisini á fundinum hin 29. august 1988, – men tá naggatóðn kom í samráðingarnar og eitt uppskot var gjørt av embætisfólki at leggja fyri danska stjórnarleiðaran Poul Schlütter, tá vóru vit tjóðveldisfólk á varðhaldi, tá vit sóu, at innihaldið var rættiliga átøkt tí grønlendsku skipanini.

Hetta vildu vit ikki ganga við til, og varð hetta uppskot broytt, so tað var í tráð við upprunaliga málsetningin, sum var stungin út í kortið við atliti til undirgrundarálitini I, II, III, – valaverk – greitt úr hondum av Árna Ólafsson, Jalgrim Hilduberg og Halgir W. Poulsen.

At Atli Dam so dregur skilamannin Finnboga Ísaksson uppí hetta hansara illsinnisgleps, sigur ikki so lítið um trúðvirði í grein hansara, tá Finnbogi Ísaksson, sum tá var uttanfyri Tjóðveldisflokkin, sigur okkum í, hvat politikarar tjóðveldisfloksins tókust við á politiska víðvøllinum.

Hvør, ið stendur mest nakin aftaná hendan løgna orðadrátt, kann lesarin best meta um?

# Íbúðarneyðin í Føroyum

**Tummas E. H. Joensen**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Íbúðarneyð er nærum allastaðni í Føroyum, og hetta verður ofta gjørt til ein trupulleika, sum serliga er galdandi fyri Tórshavn. Men hví ikki byggja við Skálafjørðin?

Hví skal tað altíð vera altavgerandi hvussu tað er í Havn? Hvussu koma vit øll, ið búgva uttanfyri Havnina sum skjótast til Havnar? Hvussu fái eg eini hús í Havn (sum ofta eru fleiri ferðir dýrari enn á bygd) o.s.fr.?

Hvat við at seta spurningin fram um, hvussu eg skjótast komi til arbeiðis? Hvussu langa tíð skal eg brúka til tað hvønn dag? Hvat skal eg gjalda fyri hetta og fyri húsini, sum eru neyðug hjá teimum felstu?

**Í Havn ella uttanfyri Havnina?**

Um tú býrt í Havn og skalt koyra til arbeiðis hvønn morgun, so brúkar tú ofta minst ein hálvan tíma til arbeiðis, tí ferðslan í býnum er so nógv.

Tann sum harafturímóti býr uttanfyri Havnina (til dømis í Sundalagnum), skal eitt sindur fyrri upp um morgunin, men er tó líka skjótur til arbeiðis í Havn, sum havnarborgarin. Munurin er, at havnarborgarin skal koyra í nógvari ferðslu alla tíðina (bæði til barnagarðin til børnunum og til arbeiðsplássið), meðan borgarin í Sundalagnum ikki í sama mun verður hindraður av ferðsluni.

**Fyrimunir uttanfyri Havnina**

Hvørjar fyrimunir hevur so borgarin, ið býr uttanfyri Havnina? Jú, hann hevur nógv lættari við at fáa sær eitt grundstykki, samstundis sum hann sleppur fleiri hundraðtúsund krónur bíligari fyri húsini. Av tí at húsini hjá honum eru nógv bíligari, kann hann, nógv fyrri enn hin, realisera nógv av sínum ynskjum, sum vit menniskju nú einaferð hava.

Eg haldi, at vit føroyingar áttu at broytt hugburðin eitt sindur. Hví ikki seta sær spurningin, hvussu vit til dømis koma skjótast til Skálafjørðin? Við Skálafjørðin og her um vegir eru nógv arbeiðspláss. Samstundis skulu vit hugsa um, at her eru rættiliga góðar framtíðarvánir, tí at vinnulívið veksur við nógvari ferð.

Tá Vágatunnilin og Klaksvíkstunnilin eru komnir, verður Skálafjørðurin tann Føroyski miðstaðurin, har øll hava lætt við at koma til.

Eg haldi tí, at at skulu landsins myndugleikar fara undir at stuðla íbúðarbygging, so má tað metast skeivt, ikka at hugsa fyrst og fremst um Norðstreymoy og Eysturoynna, tí her eru møguleikarnir fyri framtíðina ómetaliga stórir, uttan at tað verður ov trongligt hjá nøkrum.



VIÐMERKINGAR

# Mótmælisskriv viðvíkjandi stongsli í Vágahavinum kassa 1. vestanfyri Sandoynna

**Útróðrarfeløgini**
*Eystan Múla / Klaksvíkar / Leirvíkar / Fuglafjarðar*



Vit kunnu á ongan hátt góðtaka tíðaravmarkaða veiðibannið, sum Landsstýrismaðurin í fiskimálum Jørgen Niclasen hevur framt av kassa 1 í vágahavinum, vestanfyri Sandoynna.

Grundgevingin fyri hesari ónøgd er, at vit frammanundan eru nógv skerdir av friðingarøkjum norðanfyri, og umframt tað so hava vit trolingina á landleiðini har, eins og stóru línubátarnir eisini hava loyvið at royna millum 6 og 12 fjórðingar úr landi.

Við víðkanini av friðingini av kassa 1 í vágahavinum er tað givið, at teir bátar í vanliga troyta hesa leiðir, vegna núverandi stogsli í vágahavinum, allir koma norðurum at royna har einki økið er at royna á, tá gýtingarleiðirnar allar eru stongdar aftaná 15. februar.

Samgongan við Jørgeni Niclasen sum fiskimálaráðharra burdi vit, at Klaksvík – Fuglafjørður – Leirvík – Hvannasund og Norðdepil er ein týðandi partur av landsins inntøku, sum gevur livibreyð til nógvar familiur um hesar leiðir.

Stemmu fiskarí gevur lítið í landskassan í mun til rokfiskarí, men tá Jørgen Niclasen tvingar nærum allan útróðrarflotan á norðhavið, við áðurnevnda stongsli, nú várróðurin stendur fyri framman, tá man fiskimaðurin óiva hugsa seg meir enn einaferð um, hvør rættast er at sita við róðri í einum so týdningarmiklum starvi, vit sum hava hetta sum livibreyð høvdu ikki roknað við at fólkaflokkurin fór at stinga okkum so meint í ryggin nú valið stendur fyri durum.

# Hjúnarbandið og skattaskipanin

**Bill Justinussen**
*Miðflokkurin*



Hví ber tað ikki til at seta í verk eina serliga skatting fyri hjún? Vit hava serligar skattareglur á nógvum økjum.

- Sjómenn verða serskattaðir.
- Langfarasjómenn verða serskattaðir.
- Partafeløg hava sína egna skatt.
- Onnur feløg verða skattað á serstakan hátt.
- Útlendingar í Føroyum verða serskattaðir.
- Føroyingar í útlondum verða skattaðir eftir serligum reglum.
- Dagpleygumammur verða serskattaðar.
- Áhugafeløg v.m. verða als ikki skattað.
- Løgtings- og landsstýrisfólk fáa serligar afturberingar úr landskassanum
- Deyðsbúgv hava sína egnu skatting.

Men hjún, sum ynskja at vera um børn síni døgnið runt, skulu fyri einhvønn prís haldast uttanfyri skattafyrimunir, sum annars eru vanligt fyribrygdi sambært omanfyri vísta yvirlit. og nú eru tað bert 379 hjúnafelagar eftir í Føroyum, sum ikki hava lønt arbeiði. Tað merkir, at politikkur sosialismunnar og kapitalismunnar til fulnar hevur eydnast á hesum øki: Staturin skal uppala børnini og arbeiðsmarknaðurin/kapitalurin ger krav upp á allar vinnuførar hendur. Eftir standa børnini, sum ikki eru før fyri at tala sína søk. Hóast teirra størsta ynski er, at mamman skal vera heima í uppvakstrarárunum, verða tey givin í varðveitslu hjá meiri og minni útbúnum pedagokum, sum sjálvandi gera sítt besta, men sum ongantíð kunnu koma í móðurs stað.

**Valmøguleikin**

Eg tosi ikki um at jakstra foreldur av arbeiðsmarknaðinum og heim, men um VALMØGULEIKAN. Tí sjálvandi skulu fólk hava møguleikan at velja, hvussu tey ynskja at skipa síni heimligu viðurskifti. Vilja bæði vera á arbeiðsmarknaðinum, er samfelagið í fullari ferð við at innrætta seg eftir hesum; í so máta er fult valfrælsi. Men um annar ynskir at vera heima, meðan børnini eru smá, er fíggjarliga grundarlagið ikki til staðar, uttan so, at talan er um óvanliga høga inntøku ella óvanligar treytir annars. Undir øllum umstøðum hava landsins myndugleikar onki gjørt fyri at endurskapa valmøguleikan, sum var fyri nógvum árum síðani. Alt samfelagið verður í hesi tíð innrættað eftir, at øll skulu arbeiða og at øll børn skulu ansast á stovni.!! GONGDIN ER VANDAMIKIL og kemur at hava syrgiligar menniskjaligar avleiðingar í framtíðini.

**Hjúnarskattur**

Ført verður fram, at um ein serligur skattur fyri hjún verður settur í verk, verður hetta ein stór útreiðsla fyri landskassan, tí so vilja nógv velja at arbeiða heima heldur enn úti. Hetta er í sjálvum sær ein ásannan av, at ikki øll eru so glað fyri at arbeiða úti, sum nøkur vilja vera við. Men hugsa vit eitt sindur longur, hvørjar eru sotær mammur (tað vil í flestu førum vera tær, sum talan er um), sum velja at siga arbeiðið upp og vera heima? Helst eru tað mammur við fleiri børnum. og her kann eitt áhugavert dømi nevnast: Ein mamma eigur trý børn, sum eru á ansingarstovni. Hon velur at siga upp, tí nú kann hon sita heima og ansa børnunum, og tí vil tað fyri samlaða húsarhaldsbúskapin loysa seg eins væl hjá henni at vera heima. Hendan mamman frígevur 3 ansingarpláss og gevur sostatt pláss fyri trimum ansingarplássum, tvs. tríggjar mammur við einum barni kunnu koma á arbeiðsmarknaðin, tí nú fáa tær ansingartrupulleikan loystan. Hetta dømið er beinleiðis í andsøgn við grundgevingarnar hjá teimum, sum mótmæla hjúnarskatting. Hetta dømið tryggjar landskassanum meiri inntøkur, tí tríggjar inntøkur fleiri verða at skatta av, meðan ein inntøka verður lættari skattað. Dømið er nevnt fyri at vísa á, at hjúnarskatting ikki bara vendur ein veg fyri landskassan

Hugsa vit okkum harafturat, at streymurin av mammum, sum siga upp, verður so stórur, at nógv ansingarpláss verða tøk, so er hetta jú ein áhugaverd loysn á dagsins ansingartrupulleikum, sum eru við at stiga nógvum politikkarum til høvdið. So góði KARSTIN HANSEN, hvat bíða vit eftir. Tað liggja nógvir fyrimunir í serskatting av hjúnum. Far til verka!!

**Fólkaflokkurin, Jógvan á Lakjuni og hjúnarskattur**

Jógvan á Lakjuni skal hava rós fyri, at hann hevur roynt at fara nakað við hetta málið. Men góði Jógvan! Flokkur tín hevur nú sitið í samgongu so at siga øll nítiárini. Tvær ferðir við løgmanni, og tvær ferðir við fíggjarmálaráðharrann, minnist meg ikki heilt skeivt. Hví í allari víðu verð hava tit ikki megnað at loyst hetta málið??? Eru tit ikki nóg sterkir ella eru hetta bara orð? Hví skulu fólk velja Fólkaflokkin, tá flokkurin ikki megnar at fremja tey mál, sum hann sigur seg at virka fyri? og kanska er talan meiri um manglandi vilja enn nakað annað. Tí tá Fólkaflokkurin við Anfinni Kallsberg sum fíggjarmálaráðharra á odda innførdi sjómansfrádráttin, varð tað gjørt hóast harða mótstøðu frá fleiri síðum. Hevði viljin verið til staðar tá, kundi hjúnarskatturin saktanst verið framdur.

**Sambandsflokkurin og hjúnarskattur**

Sambandsflokkurin hevur havt júst sama møguleika sum Fólkaflokkurin. Men heldur ikki hann enntá við løgmanni, gjørdi tað allarminsta fyri at fremja hendan skattin. Er tað eisini bara orð uttan innihald frá tykkara síðu? Tit høvdu ein tingmann fyri nøkrum árum síðani, sum nú sigur seg hava mist áhugan fyri politikki. Hann gekk á odda fyri at innføra eina skipan, sum skilir hjún sundur í skattainnkrevjingarspurninginum, tvs. konan kann ikki hefta fyri skattin hjá manninum og øvugt. Tað kann í fyrstu syftu tykjast at vera ein góð skipan, men sæð í størri høpi er hetta ikki gagnligt fyri hjúnarbandið. Hetta er við til at skilja hjún sundur fíggjarliga og ábyrgdarliga á skattaøkinum. og so er tað mær upplýst einasta skipan í heiminum av sínum slag. Ikki serliga gott fyri eitt samfelag, sum sigur seg at verja hjúnarbandið og byggja á kristnu lívsvirðini.

**Ongin familjupolitikkur**

Okkara samfelag hevur meiri enn nakrantíð brúk fyri veruligum familjupolitikki. Hvussu nógvar costbenefit kanningar eru gjørdar av trivnaðarviðurskiftunum hjá føroyingum í dag? Tað verða pengar oystir út at gera cost-benefit kanningar um veruleikafjarar tunnilsverkætlanir v.m., meðan tað ongantíð verður sett spurnar-tekin við, hvussu vanligi føroyingurin trívist og fer at trívast við lógarbroytingum av einum og øðrum slagi. Hevði tað ikki verið rímiligt at kannað trivnaðin hjá vanligu familjuni og serliga børnunum og teimum gomlu við ávísum millumbilum, so tey ráðandi kundu fingið eina fatan av, hvat rørist í fólkinum? Hevði tað ikki verið rímiligt at spurt m.a. hvussu nógv hjún høvdu havt áhuga í at kunnað livað av eini inntøku heldur enn av tveimum?

Miðflokkurin fer í komandi samgongu at virka fyri einum familju- og trivnaðarmálastýrið. Nakrir stórir vinnulívsmenn úti í heimi vórðu spurdir, hvat hevur størstu ávirkan á framleiðsluevnini hjá einstaka arbeiðaranum. Svarið var trivnaður og lívsvirði. Trivnaður og vinnulív eru ikki mótsetningar, men ganga hond í hond. Tí er familjupolitikkur týdningarmikil og tí kann serskatting av hjúnum vera við til at økja um framleiðsluevnini í samfelagnum sum heild.

# Ítróttarháskúli á Svangaskarði

**Súni í Hjøllum**
*Tjóðveldisflokkurin Eysturoy*



Nývaldi formaðurin í Fótbóltssambandinum segði í síni fyrstu blaðsamrøðu, at fortreytin fyri eini framhaldandi menning av føroyskum fótbólti er, at føroyingar fáa eina fótbóltshøll innan alt ov langa tíð. Hann nevndi eisini, at tað er sera umráðandi, at hon liggur soleiðis fyri, at so stórur partur av landinum fær gleði av henni. Hann segði, at ein møguleiki er at inniloka grasvøllin á Svangaskarði á Toftum.

Undirritaði heldur, at hetta er eitt sera skilagott uppskot. Um fíggingina er at siga, at UEFA letur væl av fíggjarligum stuðli til slíkar ætlanir, og tí er als ikki talan um so stóra íløgu fyri Fótbóltssambandið.

Hendan ætlan, sum her er nevnd, gevur eisini heilt aðrar og stórar møguleikar á Svangaskarði.

Fyri nøkrum árum síðan, meðan Signar á Brúnni var landsstýrismaður, arbeiddi hann fyri at seta á stovn ítróttarháskúla á Svangaskarði. Tíverri eydnaðist tað ikki at røkka á mál ta ferðina. Hetta kom m. a. av, at ikki var pláss á fíggjarlógini.

Nú er ein gyltur møguleiki hjá landsmyndugleikunum at fáa stovnsett Føroya Ítróttarskúla, í góðum samstarvi við lokala ítróttarfelagið og FSF, fyri ein kostnað, sum ikki er so høgur, tí frammanundan eru so stórar íløgur gjørdar á Svangaskarði.

Tað er einki dulsmál, at tjóðveldisflokkurin ofta hevur gingið á odda, tá íð ungdóminum hevur verið tryggjað útbúgvingar- og frítíðarmøguleikar. Altjóða góðkendi grasvøllurin á Svangaskarði kom, meðan tjóðveldisflokkurin umsat ítróttarmál í landsstýrinum. Vónandi eydnast tað í komandi valskeiði at røkka málinum um at seta á stovn ítróttarháskúla á Svangaskarði.